

# Soma Gård

**Fyri nøkrum árum síðani valdi Bjarne Bærheim at umleggja sín bóndagarð frá at vera ein vanligan traditionellan garð til ein vitjunargarð, serliga ætlaður at geva størri og smæri børnum eitt upplivilsi**













Hugskotið at gera Soma Gård um til ein vitjunargarð kom so líðandi fyri Bjarne Bærheim.

- Eg rak jú garðin í mong ár sum ein vanligan bóndagarð. Eg eri útbúgvin innan økið. Men tað hendi jú tað, at eg ofta hevði vitjan av skúlaflokkum og eisini barnagørðum, og tað endaði so við, at eg gjørdi av at royna hetta við einum vitjunargarði, sigur Bjarne Bærheim.

Fram til 1997 kom inntøkan frá mjólkarframleiðslu og annars tí, sum ein bóndagarður kastar av sær.

- Men tað øktist bara alsamt við skúlaflokkum, sum fegnir vildu koma á vitjan, og so búnaðist tankin um, at kanska tað var vert at royna at gera garðin um til ein fulltíðar vitjunargarð, sigur Bjarne Bærheim.

Sum sagt so gjørt, og í 97 seldi hann so mjólkarkvotuna og bygdi garðin um.

- Eg byrjaði í tí smáa við djórunum um summarið og eitt sindur av jólagreyti um jóltíðir, men við tíðini er tað bygt út, og fleiri djór eru komin aftrat. Alt eru tó djór, sum á ongan hátt eru ókend á einum bóndagarði, sigur Bjarne Bærheim.



Í 2000 byrjaði hann so av álvara at byggja út við stóra anlegginum, og við tíðini komu nógvir fasilitetir aftrat.

Hann roynir so vítt gjørligt at halda seg til djór, sum finnast á bóndagørðum. Tað er tískil ikki talan um ein zoologiskan hava á nakran hátt við krokodillum og øðrum eksotiskum djórum.

Men tað finnast kortini fleiri djór á garðinum, sum ikki beinleiðis eru brúksdjór, men sum kortini finnast á einum bóndagarði, eitt nú mýs og kaninir.

Annars eru hestar, neyt, seyðir, geitir, grísar og so framvegis at síggja á garðinum.

Men umframt sjálvi djórini er eisini nógv annað, sum børnini kunnu huga sær við á garðinum. Har eru einar seks smáar elektriskar gravkýr, har er go-cart bani fyri tey smáu og har eru hoppiborgir. Eisini eru traktorar, bæði stórir og smáir, og sjálvandi ber eisini til at ríða á hestunum á garðinum.

Soma Gård er eitt av áhugaverdi støðunum í Rogaland, serliga um tú ferðast við børnunum. Og sum á so mongum øðrum barnavinarligum støðum skal tú seta meginpartin av degnum av til vitjanina. Tær nýtist heldu ikki sum vaksin at keða teg, og mettuna fær tú eisini. Antin tú so hevur grillmati við sjálvur og grillar á einari av mongu grillunum á garðinum, ella tú velur at keypa úr kombineraða grillvogninum og kioskini.

Soma Gård er vorðin ógvuliga væl umtókt sum ferðamál, og gerandisdagar er garðurin fullur av barnagarðsbørnum ella skúlaflokkum, og um vikuskiftini er so opið fyri almenninginum.

Tilsamans vitja eini 60.000 fólk Soma Gård árliga, og tað ber boð um, at garðurin er eina vitjan verdur